# Løgtingsformaðurin má velja

**Løgtingsformaðurin ætlar sær ikki bæði at vera løgtingsformaður og sita í fólkatinginum. Verður Edmund Joensen valdur í fólkatingið, má hann taka støðu til, um hann skal leggja frá sær sum løgtingsformaður ella lata varamannin røkja fólkatingssessin**

FÓLKATINGSVAL
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Løgtingsformaðurin Edmund Joensen er ein av teimum, sum bjóðar seg fram á fólkatingsvalinum týsdagin, og sambært Gallup verður valið í flokkinum fyrst og fremst ímillum hann og formannin Kaj Leo Johannesen.

Skuldi tað hent, at Edmund Joensen varð valdur í fólkatingið, ætlar hann sær at velja ímillum fólkatingið og løtingið.

– Tað ber ikki til at vera fólkatingsmaður og løtingsformaður í senn, og tí skal eg velja millum størvini, um tað kemur so langt, sigur Edmund Joensen.

– Eg ælti mær tó ikki at taka nakra støðu til hetta áðrenn valið, tí fyri tað fyrsta standa vit ikki til at fáa eitt fólkatingsumboð í løtuni, og fyri tað næsta er tað vanligt, at formaðurin í flokkinum endar ovast til valið, sigur hann.

## Eingin formlig forðing

Síðani nýggja stýrisskipanarlógin kom í gildi, hevur eingin løgtingsformaður verður valdur í fólkatingið, og tí er einki fordømi um hetta.

– Tað er einki formligt í vegin fyri, at løgtingsformaðurin kann sita í fólkatinginum eisini. Hóast løgtingsformaðurin hevur hægstu tign í politisku skipanini, so er hann í grundini bara ein vanligur løgtingsmaður við nøkrum serligum uppgávum. Tí er tað upp til løgtingsformannin sjálvan at gera av, um hann vil røkja bæði størvini, sigur Anfinn V. Hansen, sum var við til at gera álitið um stýrisskipanarlógina.

Edmund Joensen er tó avgjørdur um, at tað ber ikki til at vera løgtingsformaður og fólkatingsmaður í senn.

– Skuldi tað hent, at eg varð valdur, so fer flokkurin at umrøða støðuna, so at bæði størvini verða røkt bæði væl og virðiliga. Ein vanligur løgtingsmaður kann røkja bæði størvini, men tað kann ein løgtingsformaður ikki, sigur Edmund Joensen.

## Einki fordømi

Edmund Joensen hevur áður sitið í fólkatinginum. Hann varð valdur á valinum 21. september í 1994 ella seks dagar eftir, at hann hevði tikið við sum løgmaður.

Edmund Joensen var við, tá ið fólkatingið varð sett, men hann røkti ongantíð fólkatingssessin. Jóhannes Martin Olsen sat í fólkatingssessinum, meðan Edmund Joensen var løgmaður.

Nýtt fólkating varð valt 11. mars í 1998, og tá fall Edmund. 15. mai í 1998 legði hann frá sær sum løgmaður.

Eingin av løgtingsformonnunum síðani 1994 hava verið valdir í fólkatingið. Hvørki Marita Petersen, Jógvan Ingvard Olsen ella Finnbogi Ísakson komu tí í støðuna, at tey skuldu velja millum løgtingið og fólkatingið.

Ta støðuna kann Edmund Joensen koma í, men hann vil ikki taka støðu til valið millum løgtingið og fólkatingið undan sjálvum valinum týsdagin.

– Tað er eingin orsøk at taka sorgina ella gleðina uppá forhond, sigur hann.



*– Tað ber ikki til at vera fólkatingsmaður og løtingsformaður í senn, og tí skal eg velja millum størvini, um tað kemur so langt, sigur Edmund Joensen, løgtingsformaður*



*GoGo Blues og Lama Sea komu víðari frá tí fyrsta innleiðandi umfarinum í Prix Føroyum*

Mynd: Jens Kr. Vang

# Lama Sea tók øll á bóli

**Deja Vu snávaði, tá GoGo Blues og Lama Sea gjørdust vinnararnir av fyrsta innleiðandi umfarinum í Prix Føroyum**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Prix Føroyar byrjaði leygarkvøldið, tá tað fyrsta av fýra innleiðandi umførum var í Fuglafirði.

Seks bólkar vóru við í kappingini, og úrslitið gjørdist eitt sindur óvæntað.

Tey flestu høvdu roknað við, at Deja Vu, sum í 2003 endaði næstfremst í Prix Føroyum, kom víðari, men soleiðis varð ikki.

GoGo Blues fekk annað plássið, og so kom tað eitt sindur óvæntað á, at ungi havnabólkurin Lama Sea hevði eina sera góða framførslu og fór avstað við hinum plássinum.

Umframt Deja Vu komu heldur ikki Dimmi, SIC ella Paradox víðari í kappingini hesaferð.

Næsta umfar í Prix Føroyum verður leygarkvøldið.

Sosialurin hevur í blaðnum í morgin eina stóra frásøgn frá fyrsta undanumfarinum í Prix Føroyum.

# Einki stuttligt hjá teimum Stuttligu



*– Eg fekk átta ferðir so nógvar atkvøður bara við at fýra nakrar flatar vittigheitir av. Fyristilla tær, hvat kundi hent, um eg slapp at snakka eina løtu, sigur Johan í Kollafirði*

**– Veljarakanningin varð gjørd áðrenn nakað sum helst, og tí fara vit at fáa meira enn eitt prosent av atkvøðunum, sigur Johan í Kollafirði**

FÓLKATINGSVAL
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Johan í Kollafirði stóð seg so væl á veljarafundinum á Kambsdali mánamorgunin, at hann fór úr einum prosenti og upp í átta prosent av atkvøðunum hjá næmingunum, sum atkvøddu í sambandi við fundin.

– Eg fekk átta ferðir so nógvar atkvøður bara við at fýra nakrar flatar vittigheitir av. Fyristilla tær, hvat kundi hent, um eg slapp at snakka eina løtu, sigur Johan í Kollafirði.

– Hetta landið er ikki so demokratiskt, sum vit halda, at tað er. Allir flokkarnir hava fingið sína egnu sending í Útvarpinum, men tað havi eg ikki. Teir hava eisini nógvar pengar at arbeiða fyri.

## Væntar meira

Sambært veljarakanningini hjá Gallup fær Hin Stuttligi Uttanflokkurin bara eitt prosent av atkvøðunum, men Johan í Kollafirði roknar við meira.

– Veljarakanningin varð gjørd áðrenn nakað sum helst, og tí fara vit at fáa meira enn eitt prosent av atkvøðunum, sigur hann.